# Ben Arabo nýggjur formaður í FOÍB




*Ben Arabo, sum hevur verið rættiliga nógv frammi í oljuhøpi seinastu tíðina, eftir at Amerada Hess hevur gjørt eitt týðandi fund á landgrunninum. Eftir er so at vita, um talan er um eitt lønandi fund. Nú verður Ben Arabo eisini formaður í felagnum hjá øllum teimum 13 oljufeløgunum, sum arbeiða í Føroyum. Her er hann stæddur á Oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum herfyri*

*Mynd Jan Müller*

**- Tað er einki annað enn náttúrligt og rætt, at føroyingar taka við týðandi álitsstørvunum í oljuvinnuni, sohvørt oljumenningin fer fram heldur nýggi formaðurin í FOÍB, Ben Arabo, sum formansstarvið sum eina stóra og spennandi avbjóðing**

FØROYINGAR OG STØRV Í OLJUVINNU
*Jan Müller*

Sohvørt oljuvinnan mennist taka føroyingar yvir fleiri av týðandi størvunum í vinnuni. Eitt slíkt týðandi starv er formaðurin í FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur, (Faroes Oil Industry Group) har tey 13 oljufeløgini, sum hava leitiloyvi við Føroyar, eru limir. Felagið, sum er tað upprunaliga GEM men sum varð broytt og endurskoðað herfyri, hevur gjøgnum árini havt útlendskan formann. Halvor Snarvold, sum hevur verið við í oljumenningini í Føroyum síðani fyrst í 90-unum, hevur verið formaður fyrst í GEM og síðani í FOÍB, til fyri nøkrum døgum síðani. Á fundi í stjórnarnevndini hjá FOÍB, sum varð hildin í Keypmannahavn herfyri, varð Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess í Føroyum valdur til nýggjan formann. Á sama fundi varð eisini valdur nýggjur formaður fyri jarðtøknibólkin undir FOÍB. Tað er Steve Smith úr Shell. Samanbera vit við viðurskiftini í grannalondunum er tað nærmasta vit koma til eitt líknandi felag sum FOÍB, tað norska OLF, Oljeindustrien Landsforening og tað bretska UKOOA, UK Offshore Operators Association.

FOÍB umboðar oljufeløgini, ið eru loyvishavarar á føroyskum øki. Hesi eru Agip, Amerada Hess, Atlantic Petroleum, British Gas, BP, Dong, Enterprise, Føroya Kolvetni, Phillips, Statoil, Veba og Shell. Endamálið við FOÍB er at umrøða mál av felags áhuga og at vera umboð fyri samskifti vegna oljuvinnuna í Føroyum. Eisini er endamálið at samstarva um at fáa til vega vitan og royndir til gagns fyri oljuvinnuvirksemi á føroyskum øki. Vísingaligar kanningar og greiningar undir FOÍB halda fram, og verður seinasta hond løgt á verkætlaninar fyri 2002 í løtuni upplýsir Atlantic, sum hevur ábyrgdina av umsitingini av FOÍB virkseminum.

Ben Arabo, sum er útbúgvin búskaparfrøðingur og sum hevur arbeitt hjá Amerada Hess í Bretlandi og í Føroyum í fleiri ár, er ein av teimum ungu føroyingunum, sum er komin sær framat í oljuvinnuni, sum er við at fáa fótin fyri seg í Føroyum. Hetta er sama gongdin, sum man hevur sæð í t.d. Noregi, har vælútbúnir norðmenn sohvørt oljumenningin fór fram tóku yvir leiðandi størvini í vinnuni, sum útlendingar frammanundan høvdu umsitið.

Ben Arabo er fegin um nýggju avbjóðingina og vísir á, at tað verður eingin løtt uppgáva at fylla karmarnar út eftir Halvor Snarvold, sum hevur verið formaður í GEM og nú í seinastuni eisini í FOÍB øll árini. – Eg haldi, at Halvor Snarvold hevur gjørt eitt ómetaligt gott og stórt arbeiði, og eg fari at gera brúk av tí, sum hann hevur bygt upp øll hesi árini sigur Ben Arab, sum heldur nýggju avbjóðingina verða spennandi, nú oljuleitingin á landgrunninum júst hevur traðkað sínar barnaskógvar.

Sjálvur heldur Ben tað eisini vera røttu leiðina at ganga, tá føroyingar verða settir í týðandi og ábyrgdarfull størv í oljuvinnuni. Tað er einki meira náttúrligt enn tað.

Í FOÍB eru fimm ymsir bólkar. Umhvørvisbólkurin, formaður Arne Myhrvold, Statoil, Leitingar- og jarðtøknibólkurin, formaður Steve Smith, Shell, Verkfrøðið og operationelli bókurin, formaður John Thorogood, BP, Trygd og tilbúgvingarbólkurin, formaður Paolo Linzi, Agip og Fíggjar- og lógarbólkurin, formaður Ben Arabo, Amerada Hess.

Upprunin til FOÍB er GEM, sum byrjaði miðskeiðis í 90-unum við tí endamáli fyrst og fremst at samskipa øll tiltøk, sum høvdu við umhvørvið at gera. Fyrra fyrstu ferð í alheims oljusøguni tóku oljufeløg og myndugleikar seg saman í eitt samarbeiði fleiri ár, áðrenn loyvi vórðu givin og farið varð at bora. Hetta samstarvið hevur havt við sær eina røð av kanningum av umhvørvinum og hevur tað givið eitt nú føroyskum stovnum, fyritøkum og einstaklingum førleika, sum aftur kann fáa stóran týdning fyri framtíðina oljutilgongdina. Tá oljuleitingin byrjaði varð mett, at GEM lutvíst hevði gjørt sum arbeiði, men at tað átti at fylgjast upp og at nýggjar uppgávur áttu at takast við í arbeiðið. Úrslitið var stovnanin av FOÍB. GEM hevur seinastu árini brúkt einar 12 mill. kr. um árið og verður mett, at fíggjarætlanin hjá FOÍB fer at liggja um nakað tað sama. Tað eru loyvishavararnir, sum rinda peningin.



*Halvor Snarvold, sum hevur gjørt eitt megnar arbeiði í GEM øll hesi árini. Hann fer í eina tíð framvegis at hava tilknýti til FOÍB*

*Mynd Jens K Vang*




*Kortið vísir okkum bygnaðin í FOÍB*

# ítróttur

Nr. 239 • týsdagur • 11. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hanna tók heitið frá Sóley




*Hanna Dalsgaard gjørdist Miss Galaxy Europe 2001. Hon vann frammanfyri tvær aðrar føroyskar gentur*

*MYND: Jonhard Hammer*

**Hanna Dalsgaard av Argjum gjørdist ársins Miss Galaxy Føroyar 2001. Hetta gjørdist greitt eftir at bara ein av teimum trimum føroysku gentunum fullførdu kappingina. Íslendska gentan, Sigurlína Guðjónsdóttir, vann Miss Galaxy Europe kappingina**

MISS GALAXY
*Stefan í Skorini*

Fríggjakvøldið var Miss Galaxy kappingin í høllin á Hálsi í Havn. Heilt fá fólk sýndu tiltakinum áhuga við at møta upp í høllini, og tí var spenningurin ikki so stórur, tá luttakararnir langt um leingi komu fram á pallin.

Tað endaði við, at Hanna Dalsgaard av Argjum vann kappingina millum tær tríggjar føroysku genturnar. Hinar báðar vóru Tóra W. Reinert úr Havn og Sóley Ísaksdóttir Jacobsen, ið vann kappingina í fjør. Hvørgin teirra fullførdi forðarenningina, og tí var Hanna Dalsgarð sjálvsagdur vinnari.

Kappingin er soleiðis skrúvað saman, at tað snýr seg um at síggja gott út og samstundis at vera væl fyri kropsliga.

Miss Galaxy varð skipað soleiðis, at har vóru fimm útlendskir luttakarar og tríggir føroyskir. Tann fremsti samanlagt gjørdist Miss Galaxy Europe og tann fremsti millum teir føroysku luttakararnar gjørdist so Miss Galaxy Føroyar.

## Kjólar og bikini

Fyrst skuldu genturnar vísa sínar dygdir í vøkrum veitslukjólum. Ein og ein komu tær út á pallin og vístu seg fyri áskoðarum og dómarum. Fyrst vóru tað tær fimm útlendsku genturnar og síðani tær tríggjar føroysku.

Tað tyktist, sum at tær útlendsku høvdu roynt hetta oftari, og tí vóru tær heldur tryggari í síni framførslu á pallinum. Tó stóðu tær føroysku genturnar ikki langt aftanfyri hinar eftir mínum tykki.



*Sigurlína Guðjónsdóttir vann kappingina samanlagt, og hon er tí Miss Galaxy Europe 2001. Hon var rættiliga sannførandi á forðarenningini*

*MYND: Jonhard Hammer*

Síðani skuldu tær vísa enn meira av kroppinum, og dómararnir skuldu døma um, hvussu væl snaraðar tær vóru. Hesuferð var tað í bikini. Tað sást greitt, at útlendsku genturnar vóru betri vandar kropsliga.

Tó var torført hjá einum óvandum hyggjara at taka dagar ímillum, hvør hevði lagt seg á odda eftir tær tær fyrstu kappingargreinarnar. Einki fekst at vita frá dómarunum.

Síðani var tað forðarenningin, ið telur mest av teimum trimum greinunum. Her var eingin ivi um, at tann Sigurlína Guðjónsdóttir úr Íslandi var ógvuliga væl fyri. Hon fór sum eitt fok um allar forðingarnar og legði beinanvegin sjógv millum seg og kappingarneytarnar.

Sóley Ísaksdóttir Jacobsen, ið vann kappingina í fjør, var heldur ikki eiðasør í fyrra umfari av forðarenningini. Hon hevði eina góða tíð, men hon var tó ikki eins stinn og íslendska gentan.

Genturnar skuldu tvær ferðir ígjøgnum forðarenningina, og síðani vórðu tíðirnar lagdar saman. Vinnarin var funnin við at meta um heildaravrikið í teimum trimum greinunum. Tær skulu síggja gott út og samstundis vera væl fyri kropsliga. Tó var tað úrslitið av forðarenningini, ið taldi mest, tá vinnarin skuldi finnast.

Áskoðararnir mundu ikki vera bilsnir av, at tann íslendska gentan vann kappingina. Hon var rættiliga sannførandi á forðarenningini, og tí mundi tað vera upplagt, at hon fór at vinna.

## Bara ein fullførdi

Av teimum trimum føroysku gentunum var tað bara ein, sum kom ígjøgnum forðarenningina. Tóra W. Reinert gavst eftir fyrru renningina, tí hon fekk ein ringan skaða í ryggin. Hon kundi sostatt ikki halda á vegna skaðan, og tað var væl skiljandi.

Fyrrverandi meistarin Sóley Jacobsen fekk eina góða tíð í fyrra umfari av forðarenningini, men hon fullførdi ikki seinna umfar. Miðskeiðis á breytini tók hon seg aftur og helt ikki fram. Tað var stórt spell, tí tað gav dómarunum einki annað val enn at kjósa Hannu Dalsgarð vinnara av Miss Galaxy Føroyar kappingini 2001.

Kappingin misti nógv, av at tær báðar valdu at taka seg úr kappingini, og spenningurin hvarv.

Í steðginum vóru teir báðir Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe á pallinum og undirhildu. Áhoyrararnir tóku væl ímóti teimum báðum skemtarunum, ið ikki hava latið frætt frá sær í longri tíð.

Suttligt var at síggja teir báðar aftur við nýggjum framførslum.

Sum heild eydnaðist tiltakið ikki serliga væl. Ógvuliga fá fólk høvdu leitað sær niðan í høllina á Hálsi, og tí var eingin stemningur í høllini, meðan kappingin fór fram. Kanska var tað ov kostnaðarmikið at sleppa inn, ella er hetta ikki rætta tíðin at hava slíka kapping. Kappingin var eisini nógv seinkað, og hon var ikki líðug fyrr enn ein tíma ov seint eftir skránni. Í fjør var høllin full, og spenningurin var í hæddini.

Onkur helt fyri eftir tiltakið, at tað besta við tí var skemtið.